# Berlin – ein áhugaverdur býur

Berlin er ein sera áhugaverdur býur at vitja á so mangan hátt. Umframt at vera høvuðstaður í største landinum í Evropa, so er hann eisini serligur á annan hátt. Hann er ein av nýggjastu høvuðsstaðum í Evropa. Stórbýurin, ið fyrst var ein býur, síðani býttur í tveir býir í tveimum sera ymiskum londum fyri aftur at verða samanlagdur til tann stórbý, hann í dag er vorðin til.

Berlin sigur frá eini sera sermerktari søgu, eini søgu, ið fleiri okkara minnast. At vitja í Berlin við ferðaleiðara er eisini nakað heilt serligt. At síggja tey kendu støðini, ið nú bert standa sum kám minni um eina keðiliga tíð í søgu Týskalands. Partar av Berlinmúrinum síggjast enn, og tá tú sum ferðafólk stendur eystaru megin múrin, ber til at hugsa um tey mongu, ið royndu at flýggja vesturum, hóast píkahegn og vaktartorn.

Til ber at vitja staðið, har Hitler búleikaðist og læt lív, og tú kanst vitja hópin av søvnum av alskins slagi. Í Berlin eru ymisk listaverk, ið lýsa tíðina, tá Hitler sat við raðið. Til ber t.d at síggja løgna listarverkið, ið sær út eins og ein djúpur brunnur, ið tú í fyrstani als einki høpi sær í. Hyggur tú nóg leingi niður í dýpið, sært tú hillarnar, ið mynda allar tær bøkur, ið vórðu brendar í Hitlertíðini. Eisini ber til at vitja labyrintina, ið er gjørd til minnis um allar teir jødar, ið liðu undir jagstran Hitlers.

Kurfürstendamm er kenda høvuðsgøtan í Berlin við alskins handlum, sølumiðstøðum og matstovum. Ein sannur dreymur hjá teimum, ið dáma stórar handilsgøtur.



*Berlin er høvuðsstaður í størsta landinum í Evropa, Týsklandi. Býurin hevur eina sermerkta søgu, sum flestu okkara minnast, og harafturat hevur býurin eina øgrynna av spennandi støðum, sum eru áhugaverd fyri ferðafólk*

Vælkomin á HOTEL NORÐ
• 15 dupultkømur
• Matstova til 250 gestir
• Fundarhøli
• Barr
• Náttúruvakurt
• Buss til hurðina
FO-750 Viðareiði · Tel 45 12 44 · Fax 45 12 45
hotel@hotelnord.fo · www.hotelnord.fo

VIT SELJA:
• Brotflísar
• Náttúrusteinar
• Betongflísar
• Innandurðaflísar
• Glasbyggisteinar
• Glasmosaik
• Gasbetong
• Tilhoyr
• Urtagarðs tilhoyr
Vipan
Sp/f Vípan
Víkavegur 133 • Postmoga 148 • FO-710 Klaksvík
Telefon 455161 • Telefax 455385 • kari@vipan.fo • www.vipan.fo

Buksuvadmál
1. floks
toy til skjúrt, bæði til børn og vaksin.
Toy til møttil og fóður
Buksuvadmál Pr. metur 698,-
Skálabúðin
Dr. Jakobsensgøta 21
Tel 31 53 15

WWW.B9.FO
IdealCombi Aluminium • Træ
VINDEYGU HURÐAR BYGGITILFAR
Timburmeistari Benny Larsen Millum Gilja 155
TLF. 21 62 98
b9

Kom sum Aladdin flúgvandi til Klaksvíkar
Tyrlan flýgur Tórshavn – Klaksvík
Mánadag 8.12 (bert juni, juli, august)
Mikudag 13.04
Fríggjadag 13.00
Sunnudag 13.52
Norðoya Kunningarstova · Varpabrúgvin 1 · 700 Klaksvík
Tlf 456939 · Fax.456586 · info@klaksvik.fo

BYRJAR 19. MAI
Sjálvtøkuborð hvørt leygarkvøld og sunnukvøld
bílegg á telefon 423456
HOTEL EIÐI

FLOGFELAG FØROYA
EYKA túrur til Aberdeen
Hósdagin 19. juli til sunnudagin 22. juli
Aberdeen er við sínum góðu handilsmøguleikum og bíligu prísum altíð eina vitjan verdur. Býurin hevur nógvar matstovur, náttklubbar og pubbir.
Íroknað prísin er:
• Flogferð Vágar – Aberdeen og aftur við øllum avgjøldum
• 3 nætur á Brentwood Hotel í dupultkamari við morgunmati
• Eyka fyri einakamar kr. 270,-
Sertilboð kr. 3.195,- fyri hvønn
P/F Flogfelag Føroya • Hoydalsvegur 17 • 100 Tórshavn • Tel. 34 00 00 • Fax 34 00 11 • booking@ff.fo
www.ff.fo